# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# B68 verjuleyst ímóti grammum Víkingum



Jan Ingi og Sverri í hornatøkum

Víkingur

B68

**Zoltán Bukzegi gjørdist søguligi fyrsti málskjúttin hjá Víkingi, og ungverki álopsspælarin var eisini við í fleiri av hinum málunum**

**VÍKINGUR-B68**
*Jonhard Hammer*

Dysturin í Sarpugerði í góðveðrinum mánakvøldið var søguligur. Hetta var fyrsti landskappingardysturin hjá samanlagda felagnum hjá teimum í Leirvík og Gøtu. Áskoðarafjøldin var stór, og lagið á leirvíkingum og gøtumonnum gjørdist bara betri og betri, og eftir síðsta bríksl var fýrverkarí, sum minti um gullárini hjá GÍ í nítiárunum.

Anton Skoradal var fyri fyrstu ferð ábyrgdarmaður fyri Formula liði í landskappingardysti, og hann var væl nøgdur:

- Hugburðurin var góður. Okkara góvu seg hundrað prosent, men eg fílist á, at ferðin dalaði, tá ið vit høvdu fingið fyrsta málið og eisini síðstu løtuna. Avrikið vísti, at vit eru best, tá ið ferðin er høg, og tá ið vit pressa frammarlaga.

Anton Skoradal var stað væl nøgdur við nýggja ungverska álopsspælaran, sum hann helt hevði sýnt frágera gott avrik. Tað var eisini hugaligt at ungir spælarar fingu høvi at royna seg, eitt nú Finnur Justinussen og Martin Olsen, sum ikki hevur spælt á besta liðnum áður.

- Nú Sámal Joensen er givin, er tað týdningarmikið, at vit finna nýggjan stýrimann á miðvøllinum. Hesa ferð røkti Sam Jacobsen tann leiklutin sera væl, staðfesti Víkinga venjarin.

B68 verjan átti sín stóra lut í 1-0 málinum. Zoltán Bukzegi pilkaði bóltin frá miðverjuni, streyk avstað og gjørdist fyrsti málskjúttin nakrantíð hjá Víkingi.

Heimaliðið var leikliga omaná, men tað sá út til at skula verða javnt eftir 1. hálvleik, tá ið Jann Ingi Petersen skoraði upp á brotsspark. Ransin Djurhuus peikaði á ellivu metra blettin, tí Jacob Bymar varð feldur.

Fyri úrslitið var tað avgerandi, at Víkingur stutt undan steðginum legði seg fram um aftur. Niclas Niclasen skoraði upp á brotssparkið, sum varð dømt, tí ungi B68 málverjin tøvdi eitt sindur, áðrenn hann leyp fram og var so óheppin at fella Símun Louis Jacobsen, ið var spældur leysur av Zoltán.

Eftir steðgin gjørdist munurin uppaftur meiri sjónskur. Víkingur hevði yvirvág á sentrala miðvøllinum, og víkingar høvdu eina røð av góðum álopum, sum ofta vórðu myndað í síðunum, har B68 verjan var rættuliga opin.

Tá ið tjúgu minuttir restaðu, varð heimasigurin staðfestur eftir fýra minuttum. Í báðum førum var talan um álop í høgru og avrik, har verjuspælarar vórðu yvirspældir, og í báðum førum átti Zoltán, ið mundi vera besti maður á vølli, næstsíðsta fótin á. Miðvallarin Sverri Jacobsen rann frá verjuni, eftir at bólturin varð spældur framum, og so skoraði hann, og Magnus Skoralíð, sum eisini var millum teir mest eyðsýndu, fór sjálvur inn frá høgru, áðrenn hann smekkaði bóltin í B68 málið.

B68 venjarin, Bill Jacobsen, helt, at 2-1 málið hevði avgerandi týdning, tí tað bar øðrvísi fyritreytir fyri 2. hálvleiki við sær:

- Eg kenni meg avhølvaðan. Tann stutta versiónin av orsøkini er, at okkara ikki vístu seg at vera klárar til Formula fótbólt. Mótstøðumenninir vóru skjótari, grammari og sterkari. Umstøðurnar gjørdu tað, at vit vóru noyddir at umskipa og brúka fýra, sum eru átjan ár og yngri, sum høvdu spælt fulla tíð í 1. deild leygardagin. Ungu menninir fingu rættuliga sína søk fyri. Tað átti at havt verið soleiðis, at teir vórðu skiftir inn í 10-15 minuttir, men nú fingu teir seg rættuliga royndar, staðfestir Bill Jacobsen, venjari hjá B68, sum frøddist um, at yngsti maðurin, Jóhan Símun Edmundsson, var millum teir mest eyðsýndu á hansara liði.

## FAKTA um dystin

**Víkingur-B68 4-1 (2-1)**
1-0: Zoltán Bukzegi 15.
1-1: Jann Ingi Petersen br 37.
2-1: Niclas Niclasen br 45.
3-1: Sverri Jacobsen 70.
4-1: Magnus Skoralíð 74.
**Dómari:** Ransin Djurhuus
**Víkingur:** Geza Turi - Hans Jørgen Djurhuus (Hans Pauli Petersen), Atli Gregersen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen - Sam Jacobsen, Sølvi Vatnhamar (Martin Olsen) - Sverri Jacobsen, Símun Louis Jacobsen (Finnur Justinussen), Magnus Skoralíð – Zoltán Bukzegi
**Gult kort:** Hans Jørgen Djurhuus, Niklas Niklasen
**B68:** Petur Meinhard Magnussen - Niklas Poulsen, Ralph van Dooren, Landing(Oddur Højgaard, 7.), Arnbjørn Danielsen - Kristian Anton Andreasen, Badara, Jann Ingi Petersen, André Olsen (Jóhan Dávur Højgaard, 75.) – Jacob Bymar, Jóhan Símun Edmundsson (Johnleif Højgaard, 76.)
**Gult kort:** Oddur Højgaard, Petur Meinhard Magnussen, Ralph Van Dooren

# Tveir B68 spælarar illa skaddir

**Senegalesiskur verjuspælari er skurðviðgjørdur í dag, og harvið eru tveir spælarar illa skaddir hjá B68, sum framvegis bíðar eftir uppihaldsloyvum til tríggjar útlendingar**

**B68**
*Jonhard Hammer*

Tað hevur higartil hilnast illa hjá nýuppflutta B68. Steypatapið á Sandi Skírisdag kunnu teir ivaleyst liva við. 4-1 tap í fyrsta landskappingardystinum er sjálvandi dyggur smeitur. Uppaftur verri er tað, at felagið longu hevur mist tveir spælarar, sum ikki verða tøkir nøgvu tær næstu ferðirnar, og at teir framvegis bíða eftir loyvunum hjá trimum spælarum, sum skuldu havt verið ímillum teir fyrstu ellivu.

- Senegalesiski miðverjin Landing skuldi á operatiónsborðið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í dag. Bara fimm minuttir vóru farnir, tá ið liðband undir knænum slitnaði í samanstoyti við mótstøðumann. Hann verður neyvan tøkur aftur hesu megin summarsteðgin, og tað er ógvuliga spell, tí hann hevur víst seg at vera fínur verjuspælari, greiðir B68 venjarin, Bill Jacobsen, frá.

Skírisdag spældi B68 steypadyst á Sandi. Vongverjin Jóhan Petur Poulsen hevði nógva pínu eftir dystin, men á Landssjúkrahúsinum hildu tey ikki talan var um serligan skaða. Tey bóðu hann koma aftur, um pínan ikki var burtur innan fimm dagar. Páskaaftan varð á Klaksvíkar Sjúkrahúsi staðfest, at Jóhan Petur hevði brotið beinið. Hann var gipsaður, og hann verður í besta lagi tøkur mitt í mai.

Umframt skaðarnar hevur B68 eisini aðrar trupulleikar at dragast við, sum mánakvøldið bóru við sær, at eisini tríggir aðrir spælarar ikki kundu spæla.

- Í vinardystinum hava vit havt fýra útlendingar á liðnum í senn. Vlada Filipovic hevur verið málverji, og senegalesarin Endende hevur víst seg at vera fínur miðvallari. Eisini hava vit brúkt nøgv senegalesaran Keita í álopinum. Eg hevði roknað við, at loyvini hjá teimum vóru komin upp á pláss, men tað vóru tey ikki í gjár. Tí vóru teir ikki við. Eg vóni, at uppihaldsloyvini vera klár, so teir verða tøkir leygardagin, tá ið vit fáa vitjan av NSÍ, sigur Bill Jacobsen, venjari hjá B68.